Landsbanki Føroya

FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

# Ársfrágreiðing 2022



## INNIHALD

Fíggjarligt støðufesti í hásæti ................................ 1
Nevnd ................................................................ 1
Starvsfólk ............................................................ 1
Landskassin er bjálvaður ....................................... 1
Gjaldføri landskassans............................................ 2
Fíggjarmarknaðirnir í 2022 í stuttum ....................... 4
Skuld landskassans ................................................ 5
Nettoskuld landskassans ......................................... 6
Váðastýring......................................................... 6
Kredittvirðið tað sama – Aa2 .................................. 6
Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir? ....................... 6
Búskaparráðið ...................................................... 8
Føroya Váðaráð og systemiskir váðar........................ 8
Fíggjarviðurskifti Landsbankans ............................... 10

## Fíggjarligt støðufesti í hásæti

Landsbankin virkar fyri fíggjarligum støðufesti og er fíggjarstovnur hjá landinum. Uppgáva Landsbankans er, umframt at umsita ogn og skuld landsins, at eygleiða og greina fíggjargeiran og búskapin sum heild, og gera vart við fíggjarligar váðar. Hartil røkir Landsbankin skrivarauppgávuna fyri Búskaparráðið.

Landsbankin hevur fýra høvuðsendamál:

1) Virkar fyri fíggjarligum støðufesti í Føroyum
2) Røkir gjaldførið hjá landinum
3) Røkir skuldina hjá landinum
4) Kunnar politisku skipanina og almenningin

Nevndin í landsbankanum, er samstundis eisini Búskaparráðið.

Búskaparráðið hevur sum uppgávu:

1) At gera tvær konjunkturfrágreiðingar árliga
2) Harumframt kann ráðið gera temafrágreiðingar og ráðgeva landsstýrinum í øðrum málum

Eisini er landsbankin skrivstova hjá Føroya Váðaráði. Váðaráðið hevur sum uppgávu:

1) at eyðmerkja systemiskar váðar
2) at hava eftirlit við systemiskum váðum

Landsbankin umsitur eisini Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Búskapargrunnin.

Landsstýrismaðurin setur nevndarlimirnar í landsbankanum eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum og hann velur eisini formannin.

### Nevnd

Fimm fólk sita í landsbankanevndini:

- Fróði Magnussen, formaður
- Sanna Laksá
- Helena Andreasen
- Jan Otto S. Holm
- Johnny í Grótinum

Í 2022 hevur nevndin/ráðið havt 48 fundir, harav 7 fundir hava verið í landsbankanevndini, meðan 41 fundir hava verið í búskaparráðnum. Fleiri av fundunum í búskaparráðnum hava verið virkis- og stovnsvitjanir í sambandi við at skriva konjunkturfrágreiðingar.

### Starvsfólk

Starvsøkið hjá landsbankanum kann býtast í tvey høvuðsøki: ein bankapart og ein greiningarpart. Bankaparturin arbeiðir við lántøku, skuld og gjaldføri hjá landskassanum, meðan greiningarparturin framleiðir, savnar saman og greinar hagtøl um føroyska fíggjargeiran, og kunnar um týdningarmestu viðurskiftini, ið síggjast í hagtølunum. Skrivarauppgávan fyri búskaparráðið, sum kom afturat í 2021, hevur fylt nógv hjá nevndini/ráðnum og í umsitingini hjá bankanum. Her tað er serliga konjunkturgongdin og útlit, sum vera lýst, umframt at temafrágreiðingar um relevant búskaparlig evni, verða fyrireikaðar.

Í Landsbankanum starvast átta starvsfólk umframt stjóran. Harafturat, um fíggjarætlanin loyvir tí, eru eisini tímalønt starvsfólk.

## Landskassin er bjálvaður

Lógin um Landsbanka Føroya staðfestir, at landskassin skal hava 15 prosent av BTÚ í minstagjaldføri. Ásetingin kom beint eftir kreppuna í 90-árunum fyri at tryggja, at landskassin í kreppustøðum hevur tøkan pening at rinda lønir, pensjónir og aðrar útreiðslur við. Minstagjaldførið (tiltaksgjaldførið) er nóg stórt at rinda skyldurnar í umleið seks mánaðir, hóast landskassin ongar inntøkur hevur. Minstagjaldførið í 2022 var 3,05 mia. kr. og er í 2023 3,4 mia. kr.

**Gjaldføri landskassans**
Størsti parturin av gjaldføri landskassans er sett í virðisbrøv uttanlands. Landsbankin ger eina íløgustrategi, soleiðis at landskassin fær eitt hóskandi avkast, tó við atliti til váðan og eisini við atliti til, hvussu gjaldførur peningurin er, soleiðis at hann, um neyðugt, skjótt kann gerast tøkur.

Meginparturin verður settur í stats- og real-kredittlánsbrøv (2,2 mia. í miðal í 2022), í altjóða partabrøv (773 mió. kr. í miðal í 2022) og nakað í kredittlánsbrøv (400 mió. kr. í miðal í 2022). Íløguheimildin hjá Landsbankanum liggur á heimasíðuni www.landsbankin.fo.[1]

Landsbankin kann sambært lógini um landsbankan eisini umsita ogn og skuld hjá almennum grunnum. Upphæddin hjá almennum grunnum í landsbankanum var í miðal 237 mió. kr. í 2022.

Ognin hjá hesum grunnum verður umsitin eftir sama leisti, sum ogn landskassans, og grunnarnir fáa tí sama avkast sum landskassin, tó frádrigið eitt umsitingargjald. Til ber at síggja innlánspolitikkin hjá landsbankanum á heimasíðu landsbankans.

Landsbankin veitti við ársenda 2018 íløgu-røktina út til fimm ymiskar norðurlendskar íløgurøktarar. Við árslok 2022 vóru íløgu-røktararnir fýra í tali. Landsbankin umsitur eisini sjálvur eina íløgurøð við stats- og real-kredittlánsbrøvum – hetta fyri at fáa neyðuga smidleikan í gjaldførinum til raksturin hjá landinum.

Ein lítil partur av gjaldførinum er eisini settur í alternativar íløgur, eitt nú í undirstøðukervi, private equity og mikrolán (í miðal 178 mió. kr. í 2022). Sum nakað nýtt er nakað sett í grøn lánsbrøv.




*Mynd 1 – Gjaldførið hjá landskassanum 2022*

[1] Gamalt er, at øll egg ikki mugu leggjast í somu kurv. Soleiðis er eisini við virðisbrøvum – at best er at seta pengar í fleiri enn eitt slag av virðisbrævi. Ein íløgurøð er tí ofta sett saman við ymiskum sløgum av lánsbrøvum (obligatiónum) og partabrøvum. Samansetingin hevur týdning, tí oftast gongur væl við partabrøvum, tá ið illa gongur við lánsbrøvum, og øvugt. Á fakmálið eitur tað at samvariatiónin er negativ, ið merkir at tá tað eina gongur væl gongur hitt illa. Soleiðis verður váðin meira spjaddur.

Av gjaldførinum hjá landskassanum stóðu í miðal 129 mió. kr. í Føroyum – hetta er neyðuga upphæddin til dagliga raksturin. Restin er sett uttanlands fyri at tryggja, at landskassin ikki órógvar fíggjarkervið í Føroyum, um kreppa verður. Tá tað er kreppa er sannlíkt at eisini peningastovnarnir eru í gjaldføriskreppu. Stendur landskassans peningurin tá í føroysku peningastovnunum fær landskassin ikki brúkt peningin uttan at peningastovnarnir koma í enn størri trupulleikar.

Mynd 1 vísir gongdina í gjaldførinum hjá landskassanum í 2022 (bláa strikan). Eisini sæst miðal gjaldførið fyri alt árið (grøna strikan) og minstagjaldførið (kravið á 15 prosent í gjaldføri av BTÚ, reyða strikan). Í mai 2021 var landsbankalógin broytt soleiðis, at tá umræður afturrindan ella endurfígging av landskassaláni, kann víkjast frá kravinum um 15% í minstagjaldføri fram til at næsta landskassalán fellur til gjaldingar. Í slíkum føri skal landsins gjaldføri tó ikki minka niður um 13% av BTÚ í undanfarna ári.

Sum myndin vísur, lá gjaldførið frá ársbyrjan til í juni væl omanfyri minstagjaldførið (reyðu strikuna). Tí vóru 200 mió. kr. goldnar niður á landskassans skuld, í sambandi við lántøkuna í juni. Eftir tað minkaði gjaldførið, men er so vaksið nakað aftur.

Minstagjaldførið er hækkað frá 3,05 mia. kr. í 2022 til 3,4 mia. kr. í 2023. Minstagjaldførið verður sett til 15% av BTÚ, tvey ár framman-undan, tað vil siga, at minstagjaldførið í 2023 er 15% av BTÚ í 2021. BTÚ vaks frá 2020 til 2021 við 8%, og tí veksur minstagjaldførið eisini við 8% ella 350 mió. kr. frá 2022 til 2023. Við ársenda 2022 var gjaldførið 371 mió. kr. omanfyri minstagjaldførið.

Talva 1 vísir árliga virðisbrævaavkastið hjá landskassanum síðani 2017. Avkastið var gott í øllum árunum, uttan í 2018 og 2022. 2018 var fyrsta árið við negativum avkasti síðani lands-bankin (Gjaldstovan 2013-2017) fór undir hetta virksemið. Her er týdningarmikið at vísa á, at virðisbrævakursir (partabrøv, lánsbrøv, kredittlánsbrøv v.m.) sveiggja hvønn dag. Hækkar kursurin, fær landskassin meira fyri virðisbrævið, um tað verður selt. Minkar kursurin, fær landskassin minni. Avkastið av íløgurøktini sveiggjar meira ella minni frá einum ári til annað, og var hetta sjónligt í 2018, 2019 og ikki minst í 2022.

| | Avkast % | Avkast mió. kr. |
|---|---|---|
| 2017 | 2,8 | 82 |
| 2018 | -1,4 | -36 |
| 2019 | 6,3 | 191 |
| 2020 | 1,9 | 75 |
| 2021 | 3,9 | 141 |
| 2022 | -8,6 | -313 |
| **Miðal 2017-2022** | **0,8** | **23** |

*Talva 1 – Avkast av gjaldføri hjá landskassanum síðan 2017*

Talva 1 vísir avkastið av íløgurøktini fyri hvørt ár. Men fyri at meta um, hvørt ein íløgustrategi er góð, er rættari at hyggja at miðalavkastinum yvir nøkur ár. Síðani 2017 hevur miðal av-kastið verið 0,8 prosent ella 23 mió. kr. um árið. Tað er serliga 2022, sum hálar miðalavkastið niður.

Sera stór órógv hevur verið á fíggjar-marknaðunum í 2022, og tí hava tey flestu havt negativt avkast í 2022. Til dømis hevur norski oljugrunnurin hevði eitt avkast á -14% í 2022, og flestu donsku pensjónskassarnir høvdu avkast verri enn -10%. Eisini føroysku pensjónsgrunnarnir hava havt stór negativ avkast í 2022. Tað skal tó sigast, at

pensjónsgrunnar hava nakað størri váða enn landskassin hevur, og tí er avkastið tað verri.

**Fíggjarmarknaðirnir í 2022 í stuttum**

Samanborið við eina sum heild jaliga og lutfalsliga róliga gongd á fíggjarmarknaðunum í 2021, var gongdin í 2022 merkt av ógvusligum sveiggjum og lækkandi kursum bæði á láns- og partabrøvum. 2022 var tað vánaligasta íløguárið síðani fíggjarkreppuna í 2008.

Høvuðsorsøkin til gongdina er høga og vaksandi inflasjónin í 2022, sum fekk tjóðbankarnar í øllum heiminum, frá at føra ein sera lagaligan pengapolitik, til at tátta ógvusliga í. Tjóðbankarnir hava hækkað rentuna søguliga nógv uppá stutta tíð.

Avleiðingin var, at bæði partabrævakursir og lánsbrævakursir lækkaðu ógvusliga. Partabrøvini lækka, tí tá rentustøðið hækkar, er tað eitt amboð at minka um búskaparliga virksemið. Tá búskaparliga virksemið minkar, minka yvirskotini og harvið virðið á fyritøkunum og harvið lækka partabrævakursirnir. Harafturat førir hækkandi rentan til at íleggjarar flyta pengar frá partabrøvum til lánsbrøv, og tað fær eisini partabrævakursirnar at lækka

Kursir á fastrentaðum lánsbrøvum fella eisini (per definitión) tá rentan hækkar, og rentan er hækkað søguliga nógv. Tað gjørdi, at kursirnir á lánsbrøvum fullu, sum vit ongantíð fyrr hava sæð. At bæði kursir á partabrøvum og lánsbrøvum lækka so nógv samstundis, er púra óvanligt í nýggjari búskaparsøgu.

Avkastið í 2022 av íløguróktini gjørdist -8,6% ella tilsamans -313 mió. kr. Av hesum er partur landskassans -293 mió. kr. meðan grunnarnir, sum landsbankin umsitur, áttu -20 mió. kr.

Í talvu 2 sæst miðalavkastið av ymsu virðisbrøvunum, sum landsbankin hevur gjørt íløgur í. Í øllum aktivklassum, uttan í alternativu íløgunum, er avkastið negativt, og tað er sera óvanligt.

| | Miðal íløga mió. kr. | Avkast mió. kr. | Avkast % | Býtið % |
|---|---|---|---|---|
| Partabrøv | 773 | -128 | -16,6 | 21,3 |
| Statslánsbrøv | 50 | -7 | -13,3 | 1,4 |
| Realkredittlánsbrøv | 2121 | -149 | -7,0 | 58,4 |
| Kredittlánsbrøv IG | 136 | -19 | -13,7 | 3,8 |
| Hárentulánsbrøv | 264 | -29 | -10,8 | 7,3 |
| Alternativar íløgur | 178 | 18 | 9,8 | 4,9 |
| Onnur fíggjaraktiv | 110 | -0,3 | -0,3 | 2,9 |
| **Íløgur tilsamans** | **3.632** | **-313** | **-8,6** | **100,0** |

*Talva 2 – Avkast av íløgurøðini hjá landskassanum og grunnum í 2022, býtt á virðisbrævasløg.*[2]

Trupult er at meta um gongdina í avkastinum í 2023. Vanligt er, at tá rentan hækkar, so er ein afturgongd í búskapinum væntandi. Tjóðbankar/stjórnir miða eftir og vóna, at afturgongdin verður so lítil sum møguligt, men tað er ringt at meta um. Avbjóðingin er, kanska serliga í USA, men eisini partvís í Evropa, at arbeiðsmarknaðurin er so sterkur. Tað ger tað truplari at basa inflasjónini, og so verður rentan hækkað enn meira.

Í løtuni eru útlitini meira jalig, eitt nú hevur IMF nú mett vøksturin í heimsbúskapinum at vera 2,9% í 2023 heldur enn 2,7%. Men talan er

[2] Pengar, sum landskassin hevur standandi á bók í Føroyum, verða brúktir til dagliga raksturin hjá landinum. Hesir eru ikki við í talvu 2.

tó framvegis um ein minking í búskaparvøkstrinum, tí vøksturin í 2022 er mettur at vera 3,4%.[3]

Hóast útlitini møguliga síggja eitt vet betri út fyri 2023, so eru enn stórar óvissur og váðar, sum kunnu stinga seg upp, harímillum geopolitiska støðan í heiminum, óvissa um støðuna hjá bankum og at tjóðabankarnir framvegis ikki hava bast inflasjónini, hóast hon sær út til at hava toppað. Landsbankin væntar tó, at árið fer at hilnast betri, enn 2022.

## Skuld landskassans

Marknaðarvirðið av lánsbrævaskuld landskassans var við árslok 2022 3,5 mia. kr. Skuldin hjá landskassanum er sett saman av fýra lánsbrævarøðum. Ein skal rindast aftur í 2023 og hinar tríggjar skulu rindast aftur í 2024, 2025 og 2032.

Øll fýra lánsbrævalánini eru standandi lán, tað vil siga, at bara renta, og ikki avdráttur, verður goldin í lánitíðini. Lániupphæddin verður goldin aftur í einum, tá ið lánitíðin er av.

Mynd 2 vísir miðalrentuna við ársenda, sum landskassin rindar av lánsbrævaskuldini. Í 2022 rindaði landskassin í miðal 0,7% í rentu av sínum lánum, sum við ársenda 2022 høvdu eitt marknaðarvirði á 3,5 mia. kr. Rentan, sum Føroyar í miðal rindar fyri síni lán, er nógv minkað síðani 2011, tá landskassin í miðal rindaði gott 3% í rentu av síni skuld.

Rentan er síðani 2011 bara lækkað, men í 2022 vendi, tá rentan aftur er farin at hækkað. Tað ger, at miðalrentan, landskassin rindar fyri sína skuld við ársenda 2022 var 0,7%, frá at vera 0,3% við ársenda 2021. Væntast kann, at miðalrentan, landskassin skal rinda fyri sína skuld fer at hækka næstu árini.

Landskassin rindaði í juni 2022 eitt lán aftur á 1,3 mia. kr. Hetta var gjørt við, at landskassin tók ein nýtt lán á 1,1 mia. kr. og rindaði 200 mió. kr. aftur av skuldini av tøka gjaldførinum.




*Mynd 2 – Lánsbrævaskuld: Miðalrenta við ársenda*

[3] World economic forum: IMF: World Economic Outlook is starting to recover, Feb 3, 2023.

Rentan á nýggja láninum er 1,25%, og lánið er eitt 2 ára lán. Næsta lán hjá landskassanum fellur til gjaldingar í juni 2023 og er 550 mió. kr. stórt. Umframt endurfíggingina av teimum 550 mió. kr., er neyðugt at taka upp til 350 mió. kr. afturat, treytað av búskaparligu gongdini fram til lántøkuna. Hetta fyri at taka atlit at, at minstagjaldførið í 2023 er vaksið við 350 mió. kr.

Hóast bruttoskuldin við hesi eyka lántøku økist, so er nettoskuld landskassans tó enn tann sama, tí gjaldføri landskassans økist samstundis. Sannlíkt er tí, at landskassin fremur lántøku á upp til 900 mió. kr. í vár.

**Nettoskuld landskassans**

Nettoskuld landskassans við ársenda 2022 var 100 mió. kr. Marknaðarvirðið av lánsbræva-skuldini var 3,5 mia. kr. meðan gjaldførið var 3,4 mia. kr.

Av tí at kursir á bæði partabrøvum og lánsbrøvum lækkaðu nógv í 2022, var avkastið av fíggjarligu ogn landskassans -293 mió. kr. Men tá rentan hækkar, lækkar kursurin á lánsbrævaskuldini eisini, og tí er marknaðar-virðið á rentuberandi skuldini hjá lands-kassanum eisini lækkað. Í 2022 er skuldin lækkað úr 4 mia. kr. til 3,5 mia. kr. Skuldin er lækkað partvíst tí landskassin hevur goldið 200 mió. kr. niður av skuld, men eisini tí tað hevur verið ein kursvinningur á 253 mió. kr. Tað vil siga at landskassin hevur netto mist 40 mió. kr. í 2022.

**Váðastýring**

Fyri at minka um rentuváðan, ansar landsbankin eftir at varleikin (rentuváðin) á lánsbrævaognunum og lánsbrævaskuldini ikki liggja ov langt frá hvørjum øðrum.

Meðan avkastið av fíggjarognunum hevur verið vánaligt í 2022, so er avkastið av ogn og skuld tilsamans nøktandi. Avkastið av fíggjarognum landskassans var -293 mió. kr. meðan avkastið av skuld landskassans var ein kursvinningur á +253 mió. kr. Nettoavkastið av ogn skuld var sostatt – 40 mió. kr.

Nevnast kann eisini at landsbankin ger íløgur í alternativar íløgur fyri at millum annað at viga upp í móti partabrævaváðanum. Í 2022 var avkastið av alternativu íløgunum +18 mió. kr. meðan partabrævaavkastið var -128 mió. kr.

## Kredittvirðið tað sama – Aa2

Ratingstovnurin Moody's kreddittmetir Føroyar. Seinasta kredittmetingin er frá oktober 2022. Kredittmetingin var tann sama sum frammanundan, tað vil siga Aa2 við støðugum útlitum. Hetta er triðhægsta rating av 21 møguligum. Fyri at víðka um íleggjara-skaran er ein rating neyðug, og jú betri kreditt-meting, jú betri er rentan, tá ið landið skal taka lán. Kredittmetingin hjá landskassanum kann eisini brúkast sum útgangsstøði, tá ið fyritøkur og stovnar í Føroyum skulu taka lán í útlondum.

Moody's vitjar vanliga Føroyar eina ferð um árið, sum oftast í juni. Allar frágreiðingarnar hjá Moody's um Føroyar liggja á heimasíðuni hjá Landsbankanum, www.landsbankin.fo.

## Hvør brúkar, hvør sparir, hvør lænir?

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Landsbanka-num er at hyggja nágreiniliga at, hvussu nógvir pengar eru ymsastaðni í samfelagnum, eitt nú í bankum, hjá húsarhaldum og hjá fyritøkum. Eisini verður hugt at, hvussu kapitalur ferðast, hvør eigur til góðar, hvør skyldar og javnvág millum skuld og ogn.

Í 2022 gjørdi Landsbankin, umframt árs-frágreiðingina, eina frágreiðing um fíggjarliga støðufestið fyri hvønn ársfjórðing. Í 2023 er eisini ætlanin at koma við eini frágreiðing um fíggjarliga støðufestið fyri hvønn ársfjórðing.

Fyri at taka samanum hevur landsbankin í 2022 í greiningum og tíðindaskrivum millum annað víst á[4]:

- Hóast Føroyar hava havt stóra búskaparliga framgongd seinastu árini, er fíggjarstøða landskassans verri, enn hon var í 2008, tá fíggjarkreppan rakti. Landskassin eigur at tryggja sær meira á kistubotninum tá góðar tíðir eru, so bjálving er móti verri tíðum. (9. mai)
- Gjaldjavnaavlopini hava í miðal verið 1,9 mia. kr. síðstu árini. Frá 2015 til 2020 hevur gjaldsjavnaavlopið ligið millum 1,2 mia. kr. heilt upp í 2,9 mia. kr. Í miðal hevur avlopið hesi árini verið 1,9 mia. kr. Føroyar hava havt yvirskot á gjaldsjavnanum líka síðani 2010, undantikið í 2012. (4. mai)
- Við ársenda 2021 var føroyska EGS-skuldin mett til 34% av BTÚ, meðan hon er mett at verða 30% av BTÚ í 2022. (30. des)
- At samlaða nettoognin hjá føroyingum er økt frá at vera 5,2 ferðir tøku árligu inntøkuna í 2019 til at vera 5,4 ferðir tøku árligu inntøkuna í 2020. (23. des)
- Útlánini hjá peningastovnunum veksa ikki skjótari enn búskapurin (29. apríl)
- At útlánsvøksturin hjá føroysku bankunum í oktober var 2,9%, 2,7% tá ið danskir fíggjarstovnar verða taldir uppí. (23. des)
- At donsk realkredittlán hava verið bjóðað føroyskum húsarhaldum síðani 2006. Í 2006 var skuldin hjá føroyingum í donskum realkredittstovnum umleið 150 mió. kr. tilsamans. Í oktober 2022 var støddin á realkredittlánunum 4. mia. kr. (30. des)
- Realkredittlán við broytiligari rentu eru í vøkstri. Við hækkandi rentustøðinum er fasta rentan á langu realkredittlánunum, tá fólk taka nýtt lán, økt munandi, og tað hevur elvt til, at húsarhald, sum stovna realkredittlán, nú heldur velja broytiliga rentu, heldur enn fasta rentu. (17. okt)
- Inflasjónin hækkar. Eftir at inflasjónin i eitt áratíggju hevur verið heilt lág og eisisini negativ, hækkar inflasjónin nú aftur. (9. mai)
- Rentuhækkingar skulu tálma prís-vøksturin. Við at hækka rentuna royna tjóðbankar at tálma eftirspurninginum og íløguvirkseminum hjá húsarhaldum og vinnu og fyri á tann hátt at fáa inflasjónina niður (14. okt)
- Sethúsaprísirnir eru øktir skjótari enn inntøkurnar seinastu umleið 8 árini og tað kemur fyrst og fremst av, at eftir-spurningurin eftir bústøðum er størri enn útboðið. Stóri eftirspurningurin eftir bústøðum kemur av stóru tilflytingini til Føroya seinastu árini, men eisini hava renturnar verið sera lágar hetta sama tíðarskeiðið, sum hevur gjørt tað lutfalsliga bíligt at læna pening til sethús. (20. okt)
- At flestu føroysku húsarhaldini (87%) vera rakt av rentuhækkingum. Tey, ið verða rakt av rentuhækkingunum, eru tey, sum hava lán við broytiligari rentu. (27 des)
- Renta og inflasjón kunnu tálma prísvøksturin á sethúsamarknaðinum. Prísvøkstur saman við rentuhækkingum minkar um tøkupeningin hjá føroysku húsahaldunum, og tað kann elva til, at húsarhaldini ikki longur kunnu bjóða eins høgar prísir við keyp av býli, sum frammanundan. Tað kann koma at tálma prísvøksturin á sethúsamarknaðinum. (4. apríl)

[4] Sí frágreiðingarsavn. Leinkja á forsíðuni á www.landsbankin.fo

- At sethúsaprísirnir eru lækkaðir nakað í øðrum og triðja ársfjórðini í 2022, men at miðalprísurin higartil fyri 2022 er ikki lægri, enn miðalprísurin var í 2021 (27. des)

## Búskaparráðið

Síðan mai 2021 hevur Landsbankin verið skrivstova hjá Búskaparráðnum. Búskaparráðið gjørdi tvær konjunktur-frágreiðingar í 2022, eina í mars og eina í septembur[5]. Í frágreiðingunum vísur Búskaparráðið millum annað á at:

- Tað gongur væl í føroyska búskapinum, men hóast stóra virksemið í búskapinum, hava almennu kassarnir hall. (16. sep)
- Førdi fíggjarpolitikkurin eigur at vera haldførur. Tað almenna eigur at seta í verk eitt fíggjarpolitiskt regluverk, sum tálmar almenna útreiðsluvøkstrinum fyri at fáa haldføri í førda fíggjarpolitikkin – bæði í núverandi løtu – og í longdini, tá avbjóðingarnar við vaksandi talinum av eldri fólki gerst til veruleika. (1. sep)
- Tørvur er á eini javnari íløgugongd. Føroyski búskapurin, sum bæði er pinkulítil og ein tilfeingisbúskapur, sveiggjar nógv. Fyri at mótvirka sveiggjunum krevjast støðugir útreiðslukarmar hjá tí almenna. (16. sep)
- Hóast føroyingar eru tilvitaðir um, at prísir og rentur hækka, sæst ikki nøkur stórvegis broyting í nýtsluni hjá húsarhaldunum enn. Nýtslan hjá føroysku húsarhaldunum er enn í vøkstri (juli 2022). (22. sep)
- Talið av løntakarum setur met. Í juli 2022 vóru 27.837 løntakarar í Føroyum og er tað methøgt. Samsundis er arbeiðsloysið metlágt. (20. sept)
- Framhaldandi tørvur á fleiri bústøðum (18. mars)
- Laksalús ein vaksandi avbjóðing í alivinnuni. Ein av størstu váðunum í alivinnuni í dag er lúsin. Hagtøl vísa, at fellið er vaksandi og ein sannlík orsøk er lúsin. Búskaparráðið mælir til, at myndugleikarnir hava eitt vakið eyga við gongdini, so hóskanadi átøk verða gjørd, har tað er neyðugt. (19. mars)
- Heimaflotin eigur ikki at fáa stuðul. Búskaparráðið vísur á, at tilfeingisgjald eigur at vera rindað av allari makrelkvotuni, og makrelkvotur ikki eiga av verða latnar sum stuðul til skip, ið ikki eru útgjørd til at fiska makrel. (24. mars)
- Fiskidagaskipanin eigur at vera eftirmett (24. mars)
- Óbrúktir fiskidagar úr fiskidagaskipanini. Í 2021 vóru í minsta lagi ein fjórðingur av fiskidøgunum í heimaflotanum óbrúktir og hjá summum skipabólkum meir enn helmingurin. Búskaparráðið mælir til, at óbrúktir fiskidagar vera tiknir úr fiskidagaskipanini. (24. mars)

## Føroya Váðaráð og systemiskir váðar

Føroya Váðaráð hevur fýra fundir árliga (tó tríggir í 2022) og hevði seinasta fundin í desember 2022. Váðaráðið hevur til uppgávu, eins og Landsbankin – við støði í greiningum – at eyðmerkja váðar. Meðan Landsbankin hyggur yvirskipað at váðum, hyggur Váðaráðið eftir *systemiskum* váðum.

Váðaráðið telur 5 limir og eru valdir fyri 4 ár. Fyrsta fýra ára skeiðið er runnið og ráðið er tí

[5] Sí frágreiðingarnar á heimasíðu Landsbankans undir Búskaparráðið, Frágreiðingar.

skipað av nýggjum. Limir í Føroya Váðaráðið eru:

- Malan Johansen, landsbankastjóri, forkvinna.
- Torben M. Andersen, professari, Århus Universitet.
- Bjørn R. Gudmundsson, skrivstovustjóri, Hagstofa Íslands.
- Jógvan Thomsen, stjóri Vinnustovnurin.
- Ragnfríð N. Anthoniussen, fulltrúi, Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

Váðaráðið sendir út tíðindaskriv eftir hvønn fund, sum greiðir frá umrøddu evnunum. Tíðindaskrivini liggja á forsíðuni á heimasíðuni www.landsbankin.fo.

Váðaráðið vísti í 2022 millum annað á:

- At tað eru ikki greið tekin um at systemiskir váðar eru undir umbúnað í føroyska bankageiranum,
- At vandin fyri, at bankarnir fara at fáa tap, er ikki í eygsjón í løtuni, men váðin er øktur í mun til undanfarnu árini sæð í ljósinum av stóru rentu- og príshækkingunum
- At meginparturin av skuldini hjá fyritøkum og húsarhaldum hevur broytiliga rentur og er hon tískil viðkvom yvirfyri broytingum í rentustøðinum.
- At útlánsvøksturin er minkaður og trýstið á búskapin er tálmað við, at fløskuhálsar á summum økjum á arbeiðsmarknaðinum eru loystir við nýggju fast-track skipanini. Harafturat kunnu varandi príshækkingar elva til, at innlendis eftirspurningurin fer at minka, eins og geopolitiski ófriðurin økir um óvissuna fyri føroyska útflutningin.
- At realkredittlán við skáa og fastari rentu hava verið vaksandi síðani áleið 2017, men í juli 2022 sæst eitt lítið fall. Hetta kann koma av, at húsarhald í størri mun eru farin at eftirspyrja lán við broytiligari rentu, nú ið rentustøðið er hækkað.
- At kontrasykliski buffarin eigur at vera bygdur upp í góðum tíðum. Men orsakað av stóru óvissunum í búskapinum í 2022, hevur høvi tó ikki verið at viðmæla eina hækkan av kontrasyklisa kapitalbuffaranum.
- At um alivinnan fór av knóranum eru føroysku bankarnir bjálvaðir til at kunna standa ímóti einum slíkum stoyti. Føroysku bankarnir hava eina lutfalsliga avmarkaða eksponering mótvegis laksaaling, av tí at alivinnan er væl konsoliderað og í høvuðsheitum fíggjar seg uttanlands.
- Umrøtt evnið nettrygd.
- At føroysku húskini tykjast samanumtikið at vera mótstøðufør, men Føroya Váðaráð heldur framvegis eyga við príshækkingunum á sethúsamarknaðinum og við gongdini í skuldini hjá sethúsaeigarunum.
- At Danska Fíggjareftirlitið hevur í samstarv við Landsbanka Føroya broytt háttin, sum føroysku peningastovnarnir verða stresstestaðir eftir.

Samanborið við landsbankan og búskaparráðið, sum eru ráðgevandi, hevur váðaráðið nøkur amboð. Váðaráðið kann geva eina eygbering, eina ávaring og eitt tilmæli[6] umframt at geva danska váðaráðnum úttalilsi, tá tað viðvíkir donskum málsøki.

Í 2021 brúkti váðaráðið fyri fyrstu ferð amboðið eygbering. Váðaráðið vísur á, at tað

[6] Sí meira um hetta á heimasíðu Landsbankans undir amboðum hjá Føroya Váðaráði.

kann vera ein váði at tveir myndugleikar hava eftirlit við Betri samtakinum, sum kann ávirka fíggjarliga støðufestið í Føroyum.[7]

Harumframt hevur váðaráðið í 2021 givið eitt úttalilsi til Det Systemiske Risikoråd í Danmark viðvíkjandi regulering av føroyska bústaðarmarknaðinum. Í løtuni er kunngerðin "Bekendtgørelsen om god skik for finansielle virksomheder" galdandi í Føroyum. Í mun til hesa kunngerð hevur "Bekendtgørelsen om god skik for boligkredit", sum er galdandi í Danmark, útgreinandi ásetingar um eginfígging og skuldarlutfall. Váðaráðið hevur ta fatan, at føroysku bankarnir longu lúka hesar ásetingarnar um eginfígging og skuldarlutfall, og tað er tí fyrst og fremst ein spurningur um at formalisera hesa siðvenju. So vítt Váðaráðið er kunnað, arbeiða føroysku og donsku myndugleikarnar við at fáa sett hesa kunngerð í gildi í Føroyum.

## Fíggjarviðurskifti Landsbankans

Frá 2022 er Landsbankin á fíggjarlógini, sum ein vanligur stovnur. Játtanin er á tveimum stovnsnumrum Landsbanki Føroya og Inntøkufíggjað virksemi, Landsbanki Føroya. Samlaða inntøkujáttanin var í 2022 1,6 mió. kr. meðan samlaða útreiðslujáttanin var 9,7 mió. kr., tvs. ein netto játtan á 8,1 mió. kr.

Samlaðu útreiðslurnar hjá Landsbankanum vóru 9,2 mió. kr. í 2022 samanborið við 10,1 mió. kr. í 2021. Av teimum 9,2 mió. kr. vóru 7,1 mió. lønir (6,9 mió. kr. í 2021) og keyp av vørum og tænastum v.m. vóru 2,2 mió. kr. (3,2 mió. kr. í 2021) Keyp av vørum og tænastum er í stóran mun útreiðslur til KT, virðisbrævabókhald og aðra sakkøna hjálp. Í 2021 var eisini ein stór útreiðsla í sambandi við greining av Betri samtakinum gjørd av Deloitte, og hon var ikki í 2022, tí eru útreiðslurnar tað lægri í 2022 samanborið við 2021. Á inntøkusíðuni er játtanin 1,6 mió. kr., men inntøkan gjørdist 1,8 mió. kr. Landsbankin fær inntøkur av at umsita Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og av at umsita ogn hjá almennum grunnum.

[7] Sí https://www.landsbankin.fo/fo-fo/eygbering